**Fororð – Endamálið við mappuni**

Henda handbók er eitt leitiamboð, sum inniheldur viðkomandi tilfar, sum er galdandi á arbeiðsmarknaðinum.
Her kanst tú finna sáttmálar, avtalur, lógir og kunngerðir, og annað hent tilfar, tær kann hugsast at hava tørv á.

Álitisfólkamappan er hugsað sum eitt uppslagsverk, ið er lætt at dagføra, við tað at einstøku ørkini kunnu skiftast út, so hvørt nýtt tilfar er. Soleiðis ber til at hava flest allar neyðugar upplýsingar um viðurskifti, ið ávirka dagliga arbeiðið við hondina á arbeiðsplássinum. Føroya Pedagogfelag er títt felag.

- Føroya Pedagogfelag er størsta fakfelag á almenna arbeiðsmarknaðinum í Føroyum.
- Felagið hevur umleið 2000 limir.
- Felagið samráðist um tína løn og arbeiðsviðurskifti við umboð fyri tín arbeiðsgevara.
- Saman við álitisfólkunum syrgja vit fyri, at sáttmálin verður hildin.
- Felagið veitir limum hjálp í fakligum spurningum.
- Felagið varpar ljós á fakið og avbjóðingar í almenna rúminum.
- Felagið arbeiðir við at bøta um tíni eftirlønarviðurskifti.
- Felagið avtalar samlagstrygging fyri teg.
- Treytir fyri limaskapinum standa í lógum felagsins, grein 3 og 4.

**Føroya Pedagogfelag**

Tungugøta 1

Fo-100 Tórshavn

Telefon: 357576

Teldupostur: pedagog@pedagogfelag.fo

Heimasíða: pedagogfelag.fo

Telefonin svarar:

Mánadag til mikudag: 09.00 til 15.00

Hósdag 09.00 til 16.00

Fríggjadag svarar skrivstovan ikki telefonini.

Her sært tú hvør er í nevnd felagsins.

http://pedagogfelag.fo/nevndin/

Her sært tú hvør er í umsiting felagsins.

http://pedagogfelag.fo/umsitingin/